# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Nú stundar skilnaðarløtan til



Eg sá, at til jarðarferðina hjá Atla Dam varð hin vakri sangurin hjá St. St. Blicher *Sig nærmer tiden* sungin, tí Atla dámdi hann so væl. Fyri nøkrum árum síðani gjørdi eg eina týðing av sanginum til føroyskt, og haldi at hetta kann vera eitt hóskandi høvi at prenta hana. Eisini sum ein seinasta heilsan til Atla.

**Eyðun Andreassen**

Nú stundar skilnaðarløtan til,
mær stendur vetur í hondum,
eg dvaldist her bert eitt stokkut bil,
og veit mær heim í øðrum nándum.

Eg havi vitað av míni ferð,
sum hjartað kann ikki tyngja,
og tí á dvøli í hesi verð,
eg ekkaleysur kann syngja.

Eg skuldi ivaleyst sungið meir
og helst á fagrari mæli,
men tungu løturnar vóru fleir,
ið rivu hamin á vali.

Tað var mín neyð um Guds land og hav
at spenna veingir á sveimi,
og hvønn dag kvøða til sólarkav
tey ljósu løg í hans heimi.

Eg vildi fegin av himli hátt
mín fagnað boðað í sangi,
men knossast má fyri stórt og smátt,
ein armur búrsettur fangi.

Til lítlan ugga eg onkuntíð
út millum rimarnar kagi,
sum frægast royni at taka í
við onkrum sorgblíðum lagi.

Hoyr meg, á vinur í víðu verð,
stíg her eitt legg millum løga,
tí kanska er hetta síðstu ferð,
tú hoyrir lívsfangan kvøða.

Tað berst mær fyri, tá dagssett er
í kvøld, at grindin kann bresta,
tí vil eg láta enn einaferð
farvæl, sum var tað mítt evsta.

## Samfelags- og stevnudagur fyri føroyskar útisetar

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 5. mars 2005 frá kl. 10 til 18 verður ein samfelags-/stevnudagur fyri føroyskar útisetar í á Kratholmskolen Bygħøjvej 27-29, 5250 Odense SV.

Nomið verður við ymsar síður av kristnilívinum sum útiseti - um frælsi og ábyrgd. Um tær ymsum rollurnar sum t.d. hjúnafelagi ella single, starvsfelagi, kanska foreldur, børn, vinir, samkomuuppgávuhavari í danskari ella meiri etniskari samkomu.

Ætlanin er at royna at lýsa ymsar síður av hesum gjøgnum dagin bæði á vanligum fundi og samrøðufundi og kanska á annan hátt við.

Við hendan dagin vera m.a. Øssur Berghamar og Símun Pætur á Torkildsheyggi.

Eisini verður hugnaløta við sangi og tónleiki og okkurt fyri børnini.

Áhugað kunnu venda sær til Árna Helmsdal, Odense, tel. 65961373 / 30251373 ella teldupost: arnihelm@post.tele.dk

## Kaffi móti krabbameini



Ein japansk kanning millum 90.000 fólk, ið er gjørd yvir 10 ár, vísir, at tey sum drekka kaffi dagliga ella næstan dagliga eru í minni vanda fyri at fáa krabbamein í livrina enn tey sum ikki drekka kaffi.

Hetta er tað positiva úrslitið av kanningum við djórum, sum inspireraði granskararnar frá National Cancer Center í Tokyo til at víðka kanninginia til eisini at umfata menniskju.

Granskararnir í Tokyo arbeiða enn við at kanna, hvat tað veruliga er sum ger at kaffi hevur hesa positivu ávirkan.

## Litmyndir av brúðarpørum í Vikuskiftis Sosialurin

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsan-ir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**